# Virðingin telur mest

afturum



Einki av hinum parlamentunum í norðurlondum hava ein beinleiðis rúsdrekkapolitikk. »Politikararnir hava skyldu til at vísa veljarunum virðing, og tað er eisini galdandi viðvíkjandi rúsdrekka,« verður sagt úr Svøríki

*Einki av hinum norðurlendsku parlamentunum hava nakran beinleiðis rúsdrekkapolitikk*

Sveinur Tróndarson

Tað er skyldan hjá einum tinglimi at vísa veljarum sínum virðing á øllum økjum - eisini viðvíkjandi rúsdrekka. Politikkarar eru valdir til eitt tignaðarligt starv og tí hava teir eisini skyldu at vísa sømiligan atburð.

Hetta er niðurstøðan av einum fyrispurningi, sum Sosialurin hevur sett teimum norðurlendsku parlamentunum viðvíkjandi rúsdrekkatrupulleikum í tingarbeiðinum.

**Ongar serligar reglur**

Felags fyri øll parlamentini er, at tað ikki eru nakrar skrivaðar reglur viðvíkjandi rúsdrekka, sum eru galdandi fyri politikkararnar. Tey flestu teirra hava kortini greiðar reglur galdandi fyri starvsfólkið í tingumsitingini, men ikki fyri tingmennirnar burturav.

Í Noregi er skipanin tann, at tað als ikki er loyvt at drekka rúsdrekka í arbeiðstíðini og henda skipan er galdandi fyri bæði starvsfólk hjá Stórtinginum og fyri politikkararnar.

»Heldur ikki á matstovuni hava vit loyvir til at keypa sterkt øl«, verður sagt úr norska stórtinginum.

Svenski ríkisdagurin er ikki stórt øðrvísi í so máta, tí hóast tey ikki hava ein skrivaðan rúsdrekka politikk, so eru somu reglur galdandi har.

»Tað er óformelt, men vit hava ikki loyvi til at drekka í arbeiðstíðini og vit hava heldur ikki loyvið til at koma til arbeiðis ávirkað av rúsdrekka«, verður sagt úr Svøríki.

**Virðingin í hásæti**

Tað er bert í fáum førum, at tey í norðurlendsku parlamentunum kenna til dømi um, at limirnir møta til arbeiðis ávirkaðir.

Hvørki í Svøríki, Noregi ella Íslandi kenna tey til dømi um at tingmenn ikki hava kunnað arbeitt av hesum ávum, og mett verður í øllum trimum londunum, at tað í fyrsta umfari snýr seg um virðing - fyri tinginum og fyri veljarunum.

Kortini er tað ikki óhugsandi, at einstakir tinglimir hava trupulleikar, men í teimum førunum verður tað lagt upp í hendurnar á teimum politisku flokkunum at loysa teir trupulleikarnar.

Skrivstovustjórarnir hjá svenska sosicaldemokratínum og moderatarna siga, sum í ein munn, at tað er heilt óhugsandi, at flokkarnir lata politikkararnar ganga í øðrviti í tinginum, tí tað skaðar teir sjálvar og flokkar teirra.

»Men eru einstaklingar, sum hava trupulleikar, so loysa vit hvønn einstakan trupulleika sær« verður sagt haðani.

Víst verður á, at tað kunnu vera persónligar orsøkir til, at fólk hava rúsdrekkatrupulleikar, og tí skal tað viðgerast varisliga.

**Heldur ikki í Føroyum**

Í føroysku tingumsitingini eru heldur ongar skrivaðar reglur galdandi viðvíkjandi rúsdrekka. Súsanna Danielsen, skrivstovustjóri sigur, at teirra umsiting er so lítil, at tað ikki er neyðugt við skrivaðum reglum.

»Á løgtingsskrivstovuni hava vit ongantíð havt handan trupulleikan, men vit eru so fá, at høvdu vit hann, so varð hann loystur í hvørjum einstøkum føri« sigur Súsanna Danielsen, sum leggur dent á, at hennara økið bara hevur við starvsfólkið á løgtingsskrivstovuni at gera og ikki við politikararnar.

# South Island farin fyrsta túrin

Áki Bertholdsen

Nýggi rækjutrolarin hjá vágbingum er nú farin til fiskiskap.

Hann legði frá landi sunnumorgunin og á fyrsta túrinum gekk leiðin eystur eftir í Barentshavið at royna eydnuna.

South Island hevur annars ligið á Havnini síðani hann kom til landið fyri einum mánaði síðani.

Í Havnini eru ymsar ábøtur og broytingar gjørdar, sum vórðu kravdar, áðrenn hann kundi fara til fiskiskap.

Annars var ætlanin eisini at gera ymsar aðrar ábøtur á verksmiðjuni, men bíðað verður við teimum.

Talan er eitt nú um at seta ein nýggjan kókara umborð, umframt ísgálgar skulu setast í hann.

Men tað er so leingi at bíðað eftir kókaranum, at teir gjørdu av at fara ein, kanska tveir túrar, áðrenn, ístaðin fyri at liggja og bíða

Og ætlanin er nú at seta alt í skipið ísenn, tá ið tað er klárt.

**Kostar 60 milliónir**

Tann nýggi rækjutrolarin hjá vágbingum kostar um 60 milliónir, nú hann er keyptur til Vágs.

Talan er um íslendska trolaran, Bessi, sum nú er keyptur til Vágs.

Bessi varð bygdur í 1989 til ísfisk, men í 1996 varð hann bygdur um til rækjur.

Vágbingar keyptu hann ístaðin fyri gamla South Island, sum varð seldur einum amerikanskum felag í fjør.

Men tann nýggi báturin er næstan 60 metrar langur og tekur útvið 500 tons, so talan er um eitt heilt annað skip enn tann gamli var. Hesin nýggi hevur eisini trý spøl, so at hann fær fiskað við tveimum trolum.

Nýggi vágstrolarin skal fiska fyri 31 milliónir um árið fyri at bera seg. Men tað halda vágbingar at góð útlit eru fyri, sum fiskiskapurin hevur verið tey seinastu árini.



*Nýggi rækjutrolarin hjá vágbingum er nú farin til fiskiskap. Mynd: Jens Kr. Vang*






Riggar tú til fisk ?

...vit søkja eftir 20 ungum kvinnum og monnum, ið skulu mynda føroyska fiskivinnu komandi árini.

**Eitt sindur um teg**

Tú ert púra vitandi um, at Føroyar hava brúk fyri tær. Tað sæst ikki á skræðuni, men tú hevur eitt brennandi ynski um at taka lut í at ávirka framtíðina í Føroyum.

**Eitt sindur um okkum**

Vit bjóða eina spennandi útbúgving, ið tekur støði í veruleikanum. Tað, tú lærir, kanst tú brúka, og tey, ið undirvísa, eru fólk í lyklastørvum í føroysku fiskivinnuni.

**Fiskivinnuskúlin bjóðar tvinnar útbúgvingar**

- 2 ára vinnurættað útbúgving (AIF), ið gevur beinleiðis atgongd til arbeiðsmarknaðin ella tøkniligar útbúgvingar á matvøruøkinum.

- 3 ára yrkisgymnasial útbúgving (HIF). At ein útbúgving er yrkisgymnasial merkir, at hon gevur atgongd til hægri útbúgvingar.

**Ring 424573 og bið um umsóknarblað.**



**Fiskivinnuskúlin í Vestmanna**

**Postrúm 96 - 350 Vestmanna - Tlf. 42 45 73/42 44 96 - Fax 42 44 28**

**www. fiskvest.fo - Teldupostur: fiskvest@fiskvest.fo**

stephanssons hús